# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 27.06.2016*

**Bygdaráðsfundur: 27.06.2016 kl. 16.30 til kl. 19.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 67/2016 Ognir og hølir**

J.nr. 82.01.00-G01-2-15

**Málslýsing**

Onnur viðgerð – keyp av ogn matr. nr. 429. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundi 30.05.2016.

Í januar mánaða 2016 viðgjørdi bygdaráðið møguligt keyp av ognini matr. nr. 429 Tofta bygd.

Nú fyriliggur ein avtala við avvarðandi um keyp av ognini matr. nr. 429 Tofta bygd. Kostnaðurin er kr. 725.000,00 + tinglýsingarkostnað o.a. kr. 10.000,00, íalt kr. 735.000,00.

Peningur er ikki avsettur, og støða skal takast til fígging. Eisini skal støða takast til hvat gerast skal við húsini, tá kommunan hevur keypt tey.

**Tilmæli**

Á fundi 25.05.2016 mælir Fíggjarnevndin til, at keypið verður fíggjað við tøkum peningi.

Fíggjarnevdin mælir somuleiðis til, at húsini verða tikin niður skjótast gjørligt, og innheintað tilboð viðv. niðurtøku av húsinum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt á bygdaráðsfundi 30.05.2016.

**Tilmæli**

Á fundi 23.06. 2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av, at keypið verður fíggjað við tøkum peningi.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndin var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 27.06.2016*

**Mál nr. 68/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerð**

J.nr. 02.34.02-P20-23-16

**Málslýsing**

Í skrivi 22.05.2016 søkir Alberg Gaardlykke um byggiloyvi til garð oman móti vegnum á matr. nr. 699au.

**Tilmæli**

Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til, at umsøkjarin fær loyvi til at gera garð, og at hetta verður gjørt í samráð við teknisku deild.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 69/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerð**

J.nr. 02.34.02-P20-24-16

**Málslýsing**

Í skrivi 17.05.2016 søkir Búi í Hjøllum um loyvi at ogna sær lendið, til grundstykki, burtur av matr. nr. 349 Tofta bygd.

**Tilmæli**

Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið til at selja víðari til Búa í Hjøllum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum var úti, meðan málið var viðgjørt.

**Mál nr. 70/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerð**

J.nr. 02.34.02-P20-11-16

**Málslýsing**

Í skrivi 23.05.2016 søkir Christian Andreasen um loyvi at ogna sær lendi, til grundstykki, burtur av matr. nr. 342a, 337a og 329 Tofta bygd. Stykkið, søkt verðu um, er sunnanfyri matr. nr. 342c á Høganesvegnum.

**Tilmæli**

Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið til at selja víðari til Christian Andreasen.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 27.06.2016*

**Mál nr. 71/2016 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerð**

J.nr. 02.34.02-P20-19-16

**Málslýsing**

Í skrivi 19.05.2016 søkja Súsanna M. og Jann Ingi Petersen um byggiloyvi til sethús á grundstykki teirra matr. nr. 474q. Húsini eru 149 m² til víddar við bilhúsi, og eru í tveimum hæddum.

**Tilmæli**

Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta, Súsonnu og Jann Inga Petersen, byggiloyvi til sethús á matr. nr. 474q, eftir ávísum treytum:

**Avgerð**

Tilmælið frá Tekninsku deild var einmælt samtykt.

**Mál nr. 72/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr.02.34.02-p20-16-16

**Málslýsing**

Í skrivi 05.04.2016, søkja Maria í Túni og Bergur Hansen um loyvi at ogna sær lendið til grundstykki á Heygum, burtur av matr. nr. 616a og 408a, uml. 637 m² til støddar.

**Tilmæli**

Á fundi 12.04.2016 mælir Tekniska nevnd frá, at Maria í Túni og Bergur Hansen fáa loyvi til at ogna sær lendið grundað á, at økið hevur verið ætlað sum fríøki og harumframt liggja bæði háspennings- og lágspenningskáplar á økinum.

Gjøgnum tíðina hava fleiri verið áhugaði í at ogna sær økið til grundstykkið, men hava fingið avslag grundað á omanfyristandandi.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

*Eftirfylgjandi hevur ivamál stungið seg upp viðvíkjandi grundgevingini fyri avgerðini, og tí verður málið tikið upp til nýggja viðgerð. Fyrispurningurin um viðgerðina er sendur til løgfrøðing.*

*Á fundi 17.05.2016 mælir Tekniska nevnd til at bíðja við viðgerðini av málinum, til svar fyriliggur frá løgfrøðingi.*

Í skrivi 9. juni svarar løgfrøðingurin, at fyrsta fyritreyt fyri, at kommunan kann selja stykkið er, at kommunan eigur stykkið, og vísir síðani til kommunustýrislógina §44, stk. 1 og kunngerð nr. 122 frá 22. des. 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.

Sambært løgfrøðinginum so skapar tað ikki framíhjárætt fyri ein umsøkjara, at ein umsøkjari er nakrar dagar áðrenn ein annar umsøkjari.

Praksis hjá kommmununi hevur verið, at tá ein borgari hevur fingið tilsókn um at ogna sær eitt grundstykki, hevur kommunan fyrst ognað sær grundstykkið og síðani selt tað til borgaran. Kommunan hevur ikki nakra praksis fyri, hvussu farast skal fram, tá fleiri umsøkjarar eru til sama grundstykki. Løgfrøðingurin vísir á, at tað skal nógv til fyri, at praksis hjá kommununi kann seta § 44 stk. 1 í kommunustýrislógini, um alment útboð, til síðis.

**Tilmæli**
Á fundi 24.06.2016 mælir tekniska nevnd til, at Nes kommuna ognar sær lendið burtur av matr. 616a og 408a soleiðis, at pláss er fyri einum grundøki (uml. 600 m2) til at seta eini sethús á og at selja tað víðari til bústaðarendamál, soleiðis sum byggisamtyktin hjá kommununi ásetur. Tekniska deild far heimild til at staðseta grundøkið, sum skal verða uttanfyri økið har háspennings- og lágspenningskáplarnir liggja.

Av tí at tað eru meiri enn 1 umsøkjari til sama grundøki, mælir tekniska nevnd til, at grundøkið verður boðið út alment til sølu, soleiðis sum løgfrøðiliga ráðgevingin mælir til.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 73/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J. nr. 2014-0042-0330
**Málslýsing**
Hin 04.09.2014 søkti Kjartan Højgaard um eitt uppískoytisstykki burtur av matr. 405. Umhvørvisstovan mælir nú til, at allur luturin matr. 405 verður keyptur og lagdur saman við matr. 299.

**Tilmæli**
Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til, at Kjartan Højgaard fær loyvi til at keypa allan lutin matr. nr. 405, til samanleggingar við matr. nr. 299 við ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 74/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J. nr. 02.34.02-P20-27-16
**Málslýsing**
Í skrivi 10.06.2015 søkir Marius Højgaard um loyvi at byggja ein hjall á matr.nr. 553, suður ímóti grannanum.

**Tilmæli**
Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til, at vísandi til byggireglugerðina skal fráleikin vera 2,50 m frá markinum, og mælir Tekniska nevnd tí til, at hjallurin verður fluttur á eystursíðuna, og at hetta verður gjørt í samráð við teknisku deild.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 75/2016 Parkir frítíðar/ítróttarannleggog lendisrøkt v.m.**
J.nr. 04.03.00-P20-1-16
**Málslýsing**
Í skrivi 15.06.2016 verður søkt um stuðul til at gera spælipláss við Gaddavegin, har Fifa vøllurin er. Spæliplássið er uppdeilt í seks ymisk økir.

**Tilmælir**
Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta kr. 15.000,00 til gerð av spæliplássi.

Eisini verður mælt til, at staðsetingarnar verða gjørdar eftir áseting frá teknisku deild.

Á fundi 21.06.2016 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Á fundi 23.06.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av umsiting, røkt av fastogn, spælipláss.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd, Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 76/2016 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.22.00-G01-1-16
**Málslýsing**
Tekniska nevnd hevur áður fingið heimild til at avgreiða átrokandi byggimál og onnur teknisk mál í summarfrítíði, og er ynski um, at soleiðis eisini verður í ár.

**Tilmæli**
Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til, at nevndin fær heimild til at avgreiða átrokandi mál í summarfrítíðini 2016.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 77/2016 Býarskipan, útstykkingar v.m.**

J.nr. 2014-0041-0016

**Málslýsing**

Í samb. við íbúðarbygging á Kneysum er neyðugt, at kommunan ognar sær lendið til endamálið.

**Tilmæli**

Á fundi 16.06.2016 mælir Vinnunevndin til, at kommunan ger neyðugar fyrireikingar til, at ognar sær lendið á Kneysum til íbúðarbygging, til víddar uml. 6500 fermetrar.

Mortan Højgaard var úti, meðan málið var viðgjørt.

Á fundi 23.06.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Vinnunevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Vinnunevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt

**Mál nr. 78/2016 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.32.10-S08-09-15

**Málslýsing**

Í samb. við gjøgnumgongd av rakstrinum fyri fyrstu 5 mánaðarnar 2016, samanborið við fíggjarætlanina fyri 2016 er staðfest, at tað er ov lítið avsett á nøkrum kontum, fyrisitingin mælir til fylgjandi reguleringar á Fíggjarætlanini fyri 2016.

| **Rakstur** | **tkr.** |
|---|---|
| §1 Kommunal Fyrisiting | 155 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 629 |
| §5 Mentan & Frítíð | 20 |
| §6 Teknisk mál | 182 |
| §7 Kommunal virki | 80 |
| **Rakstur í alt** | **1066** |
| | |
| **Inntøkur** | |
| §20 Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøki | **-604** |
| | **462** |
| | |
| **Íløgur** | |
| §6 Teknisk mál | 200 |
| **Íløgur í alt** | **200** |

| | |
|---|---|
| Broytingar rakstur | 462.000 |
| Broytingar íløgur | 200.000 |
| **Broytingar í alt** | **662.000** |

**Tilmæli**
Á fundi 23.06.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum til fíggjarætlanina fyri 2016, og reguleringin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 79/2016 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.03.30-P20-2-16
**Málslýsing**
Í skrivi 06.05.2016 søkir Faroe Origin um at fáa økið millum bygningarnar asfalterað. Uppá fyrispurning hevur kommunan fingið tilboð av asfaltering á havnalagnum við Faroe Origin, sum er 410 m² til víddar. Tilboðið er áljóðandi kr. 137.300,00 u/mvg.

**Tilmæli**
Á fundi 23.06.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðnum frá EM Asfalt áljóðandi kr. 137.000,00, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 80/2016 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.03.30-P20-2-16 Havnalagið
J. nr. 05.01.00-P20-7-16 Gaddavegur
J. nr. 05.01.00-P20-1-16 Lýðarsvegur
**Málslýsing**
Uppá fyrispurning hevur kommunan fingið tilboð uppá asfaltering, av havnalagnum við Rætt, Lýðarsvegi og gongubreyt á Gaddavegnum, frá EM Asfalt og HJ Asfalt. Vísandi til mál nr. 64 og 65 á bygdaráðsfundi 30.05.2016 og mál nr. 61 á bygdaráðsfundi 31.08.2015.

Kostnaðurin, hjá Nes kommunu, fyri at gera økini klár til asfaltering er kr. 474.000.

Samlaða tilboðið frá EM Asfalt er áljóðandi kr. 1.001.020 og samlaða tilboðið frá HJ Asfalt er áljóðandi kr. 1.107.525

**Tilmæli**
Á fundi 23.06.2016 mælir Fíggjarnevndin til, at arbeiðini verða gjørd og at tikið verður av tilboðnum frá Em Asfalt áljóðandi kr. 1.001.020 u/mvg. Samlaða íløgan kr. 1.475.020 verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 81/2016 Starvsfólkafyrisiting**
J.nr. 81.01.01-G01-5-15
**Málslýsing**
Tvey starvsfólk, sum vaskifólk í Tofta skúla, og sum eru í farloyvi fram til 30.06.2016, søkja um at fáa longt farloyvið, frá vaskiarbeiðinum í Tofta skúla, fram til medio mars 2017.

**Tilmæli**
Á fundi 21.06.2016 mælir Mentanarnevndin til, at umsøkjararnir fáa longt sítt farloyvi fram til medio mars 2017, og boða teimum frá, at farloyvið ikki verður longt eftir medio mars 2017.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.